## Gerhard einsamallur í Sandoynni

Gerhard Lognberg, løgtingsmaður Javnaðarfloksins í Sandoyar Sýslu valdømi, verður einasta valevni á listanum hjá Javnaðarflokkinum úr Sanoynni – nú Føroya verða eitt valdømi á komandi løgtingsvali. Gergard Lognberg varð fyrstu ferð valdur á ting í 2002 og afturvaldur í 2004 við 200 atkvøðum. Úr Sandoynni siga tey, at nógv fólk var á fundi, og at tað var einmælt samtykt bert at stilla Gerhard Lognberg upp. Henrik Old og Kristian Magnussen, tingmenn Javnaðarfloksins, vóru eisini á fundinum.



## Kunning um nýggja vinnulóggávu

1. januar 2008 kemur nýggj partafelagslóg og nýggj ársroknskaparlóg í gildi í Føroyum. Í hesum sambandi skipar Vinnuhúsið fyri einum kunningartiltaki tann 15. januar, har høvuðsbroytingarnar í lógunum, í mun til verandi lóggávu, verða lýstar. Jógvan Ellefsen, advokatur og Bjarni Arnason, grannskoðari, standa fyri kunningini, meðan Kristin Balle frá Skráseting Føroya og Søren Pram Sørensen úr Vinnumálaráðnum verða við og svara spurningum frá luttakarunum. Kunningartiltakið er ætlað virkisleiðslum: Nevndarlimum, stjórum og fíggjarleiðarum. Ætlanin var eisini at hava eitt kunningartiltak um nýggju marknaðarføringslógina, men henda datt burtur, saman við einari rúgvu av øðrum lógum, tá løgtingsarbeiðið í farnu viku steðgaði í sambandi við at val varð útskrivað.

# Frá barnasangara til poppstjørnu

**Brandur Enni fekk sum ungur tannáringur ordans gjøgnumbrot á føroyska tónleikapallinum, og nú hevur hann ment seg sum sangari og sangskrivari og hevur spælt seg inn í fína selskapið í Svøríki**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nógvir tónar eru skrivaðir og framførdir, síðani Brandur Enni við síni sjarmerandi barnarødd sang um hundapensiónina á Argjum. Sangurin um Kingoson av útgávuni hjá Kulum Rótum var helst tað fyrsta, sum tann breiða fjøldin av føroyingum hoyrdu frá sangaranum Brandi Enni. Hann hevði tó frammundan verið við á útgávuni Mánadags-Mortan.

Tá var Brandur ein fittur smádrongur við stórum sangtalenti og eini spennandi framtíð fyri framman. Nú hevur sama talent ført Brand inn í tað fína selskapið í svenska Grand Prixnum, har hann skal kappast við stórar svenskar hittmakarar sum Christer Sjøgren og E-Type.

### Poppstjørna

Brandur Helgason Enni er ættaður av Tvøroyri. Hann er blivin 18 ára gamal, er framvegis ein ungur sangari, men hevur nógv upplivilsi og nógvar royndir við sær í skjáttuni.

Googlar tú eftir Brandi Enni á tí stóra og víða internetinum, kemur tú millum annað fram á týsku útgávuna av Wikipedia, sum turt staðfestir, at "Brandur ist ein färöischer Popstar." Og poppstjørna gjørdist Brandur í stórt mát, tá ið hansara fyrsta útgáva, Waiting In The Moonlight, kom út í Føroyum 2002. Sangirnir á útgávuni vórðu tráspældir í Føroyum, hæddirnar vóru høgar næstu tíðina, og tónarnir tóku eisini land í Íslandi, har tann 13 ára gamli Brandur í eina tíð var ordilig stjørna millum børnini og tey ungu.

### Sangskrivari

Seinastu árini hevur Brandur ikki verið so sjónligur í føroyskum tónleiki, sum hann var einu tíðina, men hann hevur verið virkin, hevur ment seg nógv sum sangari, tónleikari og ikki minst sangskrivari, og framførslurnar, sum hann hevur havt í Føroyum seinnu árini, hava verið stak góðar.

Brandur hevur seinastu tvey árini samstarvað við sangskrivarar frá Air Chrysalis Scandinavia, ið er millum fremstu óheftu útgávufeløgini í Norðurlondum. Brandur lesur á svenska sangskrivaraskúlanum Musikmakarna, og í løtuni er Brandur í holt við sína aðru fløgu, sum eftir ætlan skal koma út í summar.

Tey, sum hava hug at hoyra okkurt av nýggja tilfarinum hjá Brandi, kunnu leita inn á hansara myspacesíðu – www.myspace.com/brandurenni



*Brandur Enni hevur seinastu tvey árini virkað í Svøríki, og har hevur hann nú av álvara fingið fótin fyri seg*

*Mynd: Adam Appel*

# Grand Prixið er eitt brak

**Svenska Grand Prixið verður roknað sum eitt tað besta í Europa, og har verður sera nógv gjørt burtur úr kappingini**

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Brandur Enni hevur fingið ein kjans av teimum heilt stóru, nú hann er sloppin við til svenska Grand Prixið.

Kappingin telist millum stóru hendingarnar í svenskum tónleiki, og nógvir kendir tónleikarar hava roynt seg í kappingini.

Svenska sjónvarpið ger sum vera man nógv burtur út, og hyggjarafjøldin er stór.

Svenska Grand Prixið verður av kennarum roknað sum tann besta kappingin í Europa, og seinastu fimm árini hevur kappingin fingið alt størri týdning fyri svenska tónleikamarknaðin. Og Brandur Enni kann brúka møguleikan til nakað spennandi, tí á hvørjum ári floyma Grand Prix-sangararnir inn á svenska hitlistan – og tað varðan vanliga í einar tríggjar ella fýra mánaðir.

32 sangarar eru við í kappingini, og tey bestu verða vald út til finaluna. Fyrsta innleiðandi umfarið verður tann 9. februar, og samanlagt eru fimm umfør, áðrenn sjálv finalan verður hildin í Globen í Stockholm tann 15. mars.